# Elektrona Kalkulilo

## Soleiðis eitur ein telda á málinum »esperanto«.

Í mínari matematikbók frá studentaskúlanum er eitt brot sum eitur teldur. Har er eitt brot við frágreiðing um ta bineru talskipanina og uppgávur í hesum. Tá ein er komin upp í mín aldur (omanfyri 30) kan ein, eitt sindur nostalgiskt, hyggja aftur um bak eftir útviklinginum. Tá ein nýggj tíð byrjar er málið, aftaná hugsanina, tað neyðugasta. »Í byrjanini varð orðið ...«

Hvussu eru orðini í teldtíðini vorðin til. Eru tað góð orð?

## Svenska orðið »DATOR«

Hvør hevur uppfunnið orðið *dator?* Tað er jú svensk orðkonstruktión. Í meðan vit bíðja eftir at Svenska Akademiðið verður liðugt við sína orðabók, kunnu vit hyggja í Wassens »Vára ord«. Har stendur at »orðið kom brádliga í brúk í 1969«.

Eitt tips fær meg at leita í bók hjá Børje Langefors, sum kann siga frá at tað fyrst kallaðist *databehandlingsmaskin,* sum kundi styttast til *datamaskin* mitt í fimtiárinum. Men hann helt eisini hetta verða eitt ov langt orð og kom við orðinum *dator*. Áhugavert var, at hetta orðið kom fyrstu ferð á prent í bókini hjá Langefors »Introduktion till informationsbehandling« sum kom út í 1968. Í einari viðmerking á síðu 11 stendur:

»Orðið »datamaskin« er uttan iva ofta ov langt. Tí verður orðið »data« títt nýtt í tekstum til fakliga nýtslu, sum sjálvandi er sera óhóskandi. Møguliga kunu vit ikið orðið *dator,* sum fyrr hevur verið nevnt, fram aftur (plur. datorer), analogt við t.d. »motor«.

Var byrjanin til orðið *dator* ein heppin byrjan? Arne Grip skrivar soleiðis í bókini »ADB-system och kommunikation« 1974:

»DATOR varð ein málslig nýskapan sum skjótt vann fram í fjølmiðlunum. Orðið rúmast á einari spaltu. Men orðið dator er eitt sermerkt orð. Í fólkamunni er tað blivi til »data« og í summum førum »datan«. Legg til merkis møguleikan fyri rím við helvitis harra Satan. Ein eitt sindur óndsinnaður dámur liggur yvir hesum orðinum. Tann tekniski útviklingurin verður ofta mettur sum ein náttúrumegi sum ongin kann hótta.

## Bábels torn

Førir samskiftistøknin við sær at tey ymisku málini nærkast hvør øðrum, at tey víðkast við einar felagsmongd sum fólk runt allan knøttin vilja skilja? Fær ein nýggj uppfinning, teldan, sum vinnur fram í øllum londum í heiminum, eitt universalt navn sum líkist í øllum londum? Niðanfyristandandi yvirlit vísir at soleiðis bleiv tað ikki í hesum føri.

| | |
|---|---|
| svenskt | dator |
| danskt | datamat |
| norskt | computer, datamaskin |
| finskt | tietokone |
| íslandskt | tølva |
| føroyskt | telda |
| enskt | computer |
| týskt | Rechner, Compter |
| franskt | ordinateur |
| spanskt | computador, máquina computadora |
| polskt | maszyna matematycna |
| ungarskt | adatfeldolgosó, komputer |
| turkiskt | bilgisayar, kompúter |
| swahili | kompyuta |

## Etyomologi

Tey orð, vit nýta eru vanliga gomul orð. Ígjøgnum tíðirnar skifta hesi orð eisini merking. Vit kunnu t.d. takað orðið *Winchester*. Tað er ein statur í West Virginia har teir einafer gjørdu »sjey túsund afturat« skambyrsur. Staturin við hesum skambyrsuvirkjum varð ógvuliga týdningarmikil undir amerikanska borgarkrígnum. Tá ið teir á IBM skulu gera »sjey túnund afturat« massaminni 6harddiskar), bleiv sama navn nýtt. Í byrjanini varð hetta eitt innanhýsis navn hjá IBM á júst hesum projektinum.

Enska máli verður nógv nýtt innan telduheimin. Í jagstranini efir upprunanum av teldorðum havi eg eisini nýtt æraðu Shorter Oxford Dictionery (2475 síður) frá árinum 1933. Har stendur onki um »Computer«, men um orðið *bit* = »piece bitten off«. Ein samanseting av 4 bit skuldi í telduheiminum kallast *nibble*. Hetta er eitt gamalt orð, sum verb greiðir frá við »take little bits of (a thing)«. Orðið *byte* er harímóti eitt ný smíða orð, møguliga við ávirkan av orðinum bait. Bait merkir agn, tað ein krøkir á húkin, ella »feed for horses«.

Mín vísindaliga niðurstøða á hesum er at tær minstu nøgdirnar av dáta hava nakað við at eta at gerað. Meðan tær stóru nøgdirnar verða ljótraðar. Tá eitt forrit hevur leingi um arbeiðið sítt, havi eg eisini hoyrt fólk siga: »Hon stendur og ljótrar«. Hetta ljóðar heilt sjálvsagt.

## Pappír á einum trái

Orðið *file* hevur sín uppruna í latínska orðinum «filum« sum merkir tráður. At binda bøkur merkti fyrr at binda fleiri pappír saman í ein trá. Soleiðis kom orðið *file* at merkja ein samling av pappírsørkum.

Hetta er blivi til *fil* á svenskum. Á týskum eitur tað *datei* og á fronskum *fichier*.

Týskarar hava tey mest logisku og eintýðugu orðini innan teldorð. Hvat sigur tú til dømis um *Datenübertagungsumschaltungszeichen, Datensichtgeræt* og *Informatik?*

Franskmenn hava tey vakrastu orðini: *Ordinateur, visuel, telematique, informatique* og *informatistion*.

## Inn í Norðanlondum

Tað nyttar onki at tú sigur »dator« í Danmark. »Vaba« verður svari. Tað eitur *datamat*. »En »datamat« er et apparat som kan utføre datamatik« stóð at lesa í »Magisterbladet« longu í 1966.

»Datamaten« er harafturat eisini navnið á starvsfólkamatsalinum hjá firmanum Datasaab í Linkøping. Orsaka ... hjá Ericsson Information Systems eitur tað okkurt meir. Ógvuligani smart. Eg meini navnið á matsalinum.

(Hava tit annars lagt til merkis hvussu firmanøvnini í dag eru: elektronik - data - information. Arbeiðir tú í einari fyritøku við einum ov gomlum navni, skal tú síggja til at skifta til nakað nýggjari í stíl við knowledge network systems!)

Normenn eru kendir fyri at finna upp egin orð til ymisk ting. Men nakað serskilt orð fyri teldu hava teir ikki. Annars eru teldorðini á donskum og norskum ógvuligani lík. Niðanfyri er ein lítil orðalisti:

| *svenskt* | *norskt* | *føroyskt* |
|---|---|---|
| anvændare | bruker | brúkari |
| massminne | kjempelager | massaminni |
| skivminne | platelager | diskgoymsla |
| radering | sletting | sletta |
| operativsystem | styresystem | stýrisskipan |
| anpassning | tilpassning | tillaging |
| pop-up-meny | troll-i-eske-meny | ????? |
| utrustning | utstyr | tólbúnaður |
| underhåll | vedlikehold | viðlíkahald |
| förstøra | ødelegge | oyðileggja |
| fønster | vindu | vindeyga |

(vindeyga, samaber window. Hevur sín uppruna í tí holinum í takinum sum roykurin frá opnum eldi fór upp ígjøgnum (ljóðarin). »Vindur út«).

Í mun til hini Norðanlondini hevur Finland júst somu bókstavir og tekn sum Svøríki. Finnarar hava sín máta at seta hesar bókstavir saman á. Ein heilt øðrvísi hátt enn tann í svenskarar nýta. Telda eitur *tietokone*. Tieto merkir læra (samfelagslæra), kone merkir maskina.

## Teldulandið Føroyar

*Í teldulandinum Føroyar eru fleiri teldur enn tað eru í Svøríki pc (pc merkir per capita í hesum samanhangi). Har hava tey eina fultfíggjaða teldustýrda skattaskipan, sum skattaráharri Felt skuldi tikið og hugt eitt sindur nærri eftir. Tað merkir at lønmótarin sleppur undan at geva upp.*

*Dator eitur telda. Tað kemur av at telja, —at greiða frá — at vísa, (samanber við »fortelja«.*

## Tølva, konufólk tala

Vinur mín, Halfdan Ingolfsson frá Ísafirði, sigur at telda eitur tølva á íslendskum. Tað kemur frá tala sum merkir eitt tal, í plural tøla. Tað (tal) er kallkynsorð. Orðið fyri teldu hava teir smíðja við at seta kvennkynsendingina -va afturat. Telda er soleiðis ein hon í Íslandi.



*Tv. Örjan Kærrsgard*

## Lesa, telja, skriva og ....

*Eg haldi ikki at okkara svensku teldorð, í alttjóðasamanhangi, eru góð. Til dømis orð sum fil og post. Hvussu skulu vit associera tey? Í fleiri hundrað ár, hevur man í enskum vita hvat file og record merkir.*

*Landsskúlastovnurin hevur nýligani samtykt eina undirvísingarskrá, við og um teldur, í skúlunum. Sven Moberg hevur sagt um hetta at hetta er at meta saman við avgerðini 1840-unum um at staturin skuldi bera kostnaðin av at fáa øll fólk at duga at lesa, rokna og skriva. Vit sakna tó eitt orð, eitt verb, fyri hesa nýggju yrkisgreinina - at nýta eitt forrit (program), upplýsingar og vitan í teldum. »Datera« gongur ikki, »infotera« er heldur ikki gott. Hevur tú eitt gott uppskot so send tað inn til Com-Data-blaðið. Møguligani er títt uppskot so mikið gott at tað verður nýtt í framtíðini, ikki bert í Com-Data, men møguliga í allari verðini.*

*Ørjan Kærrsgard*
*káserande datør*

Henda grein er skriva av Ørjan Kärsgaard frá fyritøkuni Soft-tolls, sum Com-Data handlar nógv við. Hon er skriva til svenska tíðarritið »Datavärlden«, men av tí at innihaldið er sera aktuelt allastaðni rundan um okkum, hava vit valt at umseta hana til Com-Data blaðið.

Com-Data
skipanir
- føroyskt!